## DAGSINS MEINING

# Trý gull – tvey silvur

Í gjár komu føroysku luttakararnir á Special Olympics aftur úr Dublin við trimum gullheiðursmerkjum og tveimum silvurheiðursmerkjum. Special Olympics eru serstakir olympiskir leikir, og føroyingar hava bæði gjøgum SvF og ÚF kunnu fylgt við hvussu ómetaliga væl okkara ungu ítróttarfólk hava klárað á serolympisku leikvøllunum í Dublin. Hesir leikir eru víðagitnir um allan heim og alheimspressan hevur dekkað leikirnar, sum talan var um teir vanligu siðbundnu olympisku leikirnar.

Á hendan hátt eru okkara umboð í Dublin vorðin víða gitin um allan heim, og tað sama kann so sigst um heimlandið, tey koma frá. Takka verið okkara framúrskarandi umboðum í Dublin eru vit komin í gott orð víða hvar. Tey fyrstu tíðindini av Guernsey eru eisini upplívandi! Føroyingar gera seg postivt kendar, tað veri seg innan talv, fótbólt, svimjing, boccia, flogbólt, kvinnufótbólt - you name it! Tað er gott og stimbrandi fyri ein lítla tjóð sum Føroyar. Vit hava nógv at takka føroysku luttakarunum fyri og eiga tey okkara størstu virðing uppiborna.

Her er veruliga talan um eina sera áhugaverda og spennandi menning innan fleiri ítróttargreinir. Tað er eingin ivi um, at allir føroyingar fegnast um hesa gongd og vóna, at hon fer at halda fram og mennast. Vit eiga ikki at gloyma venjarar og øll hjálparfólk, ið gera alt hetta møguligt. Tað verður víða hvar um landið gjørt eitt veldugt sjálvboðið arbeiðið innan ítróttin bæði hjá ÍSF og ÍSB. Uttan hetta sjálvbodna arbeiðið hevði tann professionella venjingin valla kunna farið fram. Hinvegin má ásannast, at sum gongdin er, er neyðugt við professionellari venjing og eigur hon eisini at vera nýtt í mest møguligan mun og hon eigur at verða økt.

Alt hetta er kostnaðarmikið. Øll vita, at ítróttin fær stuðul fra ymsum síðum. Men ítróttin hevur so stóran týdnng fyri ungdómin og fyri alla tjóðina, at hon eigur at fáa nógv dyggari stuðul frá landi, kommunum, stovnum og vinnulívinum, soleiðis at tann positiva menningin, sum nú sæst kann halda fram. Slíkan stuðul fer samfelagið og vit øll at fáa fleirfalt aftur í síðsta enda. Vælheimafturkomin úr Dublin og góða kapping tit øll á Guernsey.

**Sosialurin**

# Rættleiðing

**Framsagnarfrælsi**
Eitt mál, ið viðvíkur medarbeiðara á Søgu- og samfelagsdeildini hjá Fróðskaparsetri Føroya, hevur av nýggjum verið umrøðuevni í fjølmiðlunum. Ymiskt er ført fram í hesum sambandi, sum ger, at setursráðið á Fróðskaparsetrinum heldur tað vera neyðugt at koma við eini stuttari rættleiðing.

Tað hevur ongantíð verið ætlanin at forða medarbeiðaranum í at siga sína hugsan alment um hetta málið, ei heldur um onnur mál. Tað, sum álagt varð medarbeiðaranum, var í síni umrøðu av samstarvsfólki hjá Fróðskaparsetrinum at sýna høviskan málburð.

Tí er Fróðskaparsetrið ikki samt við Mentamálaráðið og niðurstøðu tess um, at fram-søgufrælsið í hesum máli er skert í óneyðugan mun. Setursráðið metir við hesum, at málið er endað og hevur tikið niðurstøðuna hjá Mentamálaráðnum til eftirtektar.

*Fróðskaparsetur Føroya tann 26. juni 2003*

**Setursráðið**
**Malan Marnersdóttir, rektari (sign.)**
**Jóan Pauli Joensen, megindeildarráðsformaður á Søgu- og samfelagsdeildini (sign.)**
**Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsformaður á Náttúruvísindadeildini (sign.)**
**Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsformaður á Føroyamálsdeildini (sign.)**

# Fundur í Føroyskum Lógar Riti

LÓGARMÁL
*Tíðindaskriv*

Hóskvøldið 3. juli verður fundur í FLR, Føroyskum Lógar Riti.

Á fundinum skal nýggj ritstjórn veljast. Í ritstjórnini, sum er hægsti myndugleiki felagsins, eru, umframt ritstjóran, ein ungur stjórnarkønur og trý lógarkøn ella løgfrøðilesandi.

Føroyskt Lógar Rit er eitt óheft løgfrøðiligt tíðarrit, ið kemur út tríggjar ferðir um árið. Í lógarritinum er fyrst og fremst tilfar, sum er viðkomandi fyri føroyska løgfrøði.

Allir føroyingar, ið lesa løgfrøði, og annars øll, ið hava hægri útbúgving, sum viðvíkur løgfrøði ella stjórnmálafrøði, kunnu møta á fundi og soleiðis vera við til at velja ritstjórnina, sum skal veljast á hvørjum ári.

Fundurin hóskvøldið verður á Landsbókasavninum kl. 19.30.

# Føroyakvøld í Fuglafirði

Hósdagin verður Føroyakvøld í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og á skránni er bæði útlendskt og føroyskt undirhald er á skránni.

Kvøldið verður hildið í sambandi við, at mentanarstevnan Nordvesten verður hildin í Klaksvík og Fuglafirði hesa vikuna.

Fólkatónleikarar og dansarar úr Noregi verða við til Føroyakvøldið, og so verður ein forvitnislig mótframsýning við føroysku Guðrun & Guðrun, Sirri og Snælduni. Hesi hava havt sýningar av sínum sermerktu klæðum bæði í Føroyum og uttanlands, og tað sigst vera eitt stórt upplivilsi.

# Grøðingar- & prædikumaðurin Hans Berntsen vitjar aftur



TÍÐINDASKRIV

Nógv umrøddi danski prædikumaðurin Hans Berntsen og kona hansara Inge vitja aftur í Føroyum 4. & 5. juli

Í hesi vikuni koma Hans Berntsen og kona hansara Inge til Føroya, har tey fara at tosa - og biðja fyri sjúkum.

Fyrsta tiltakið verður fríggjakvøldið 4. juli kl. 20 í auluni í Kommunu-skúlanum í Havn. Leygarmorgunin 5. juli verða tey í Grasagarði í Miðbýnum í Havn kl. 11. Og um kvøldið - leygarkvøldið 5. juli verða tey í fimleikahøllini í skúlanum á Glyvrum kl. 20.

Hans & Inge vóru í Føroyum í mai mánaði, har tey vitjaðu á Tvøroyri og í Havn. Nógv fólk løgdu leiðina framvið fyri at lurta, hvat Hans Berntsen hevði at siga, og ikki minst fyri at síggja, hvat hendi, tá tey bóðu fyri fólki. Stílurin hjá Hans & Inge er sum altíð, ógvuliga lættur og óformellur.

Hans Berntsen leggur stóran dent á at kunna biðja persónliga fyri fólki, og fólk upplivdu veruliga, at tað hendi nakað. T.d. ein kvinna, sum hevði verið sjúkrameldað og óarbeiðsfør í longri tíð og skuldi skurðviðgerðast. Hon bleiv, heldur óvæntað fyri læknarnar - útskrivað, tí hon var vorðin frísk. Og eini ung hjún og foreldur at lítlum barni við skeivleika í rygginum kundu staðfesta, at barnið varð vorðið púra frískt.

So hevur tú hug at uppliva Hans Berntsen hesar dagarnar - so ert tú, sum lesur hetta tíðindaskrivið - og annars øll, vælkomin til eitt ella fleiri av tiltøkunum. Møguleiki verður fyri persónligari forbøn fyri teimum, sum ynskja tað.

**Skrá fyri tiltøkini:**
Fríggjdagin 4. juli kl. 20: í auluni í Kommunuskúlanum í Havn
Leygardagin 5. juli kl. 11: í Grasagarði í Miðbýnum í Havn
Leygardagin 5. juli kl. 20: í fimleikahøllini í skúlanum á Glyvrum


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^00



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Prógv á Tekniska Skúla í Havn

**Fríggjadagin 27. juni var samkoma á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin, har maskinsmiðir, framleiðslutøkningar, húsasmiðir, elektrikarar og maskinatstøðisnæmingar fingu prógvini handaði. Samstundis var hetta fyrstu ferð at framleiðslutøkningar fingu prógv í Føroyum.**



**Maskinsmiðir**
*Hanus Gregersen, Syðrugøta, læruplass: KJ-Hydraulik á Kambsdali, Andrias Haraldsen, Tórshavn, læruplass: P/F Tórshavnar Skipasmiðju, Høgni R. Haraldsen, Sandavágur, læruplass: P/F J.K. Joensen & Sonur í Miðvági, Helgi Stefan Ingibjørnsson, Eiði, læruplass: Tórshavnar Skipasmiðju, Esbern O. Lervig, Leirvík, læruplass: P/F F.J.M. í Runavík, Tórstein Magnussen, Sørvágur, læruplass: Tavsen Maskinverkstaður í Sørvági, Mannbjørn Nesá, Nes (Eysturoy), læruplass: Mekanik í Runavík, Ragnar Nolsøe, Trongisvágur, læruplass: Sp/f Bærendsen Teknik á Tvøroyri, Aron Olsen, Toftir, læruplass: P/F F.J.M. í Runavík, Jákup Andrias Vang, Glyvrar, læruplass: P/F F.J.M. í Runavík, Høgni J. Zachariasen, Fuglafjørður, læruplass: KJ-Hydraulik á Kambsdali. Hesir vanta á myndini: Andru Lindarstein, Tórshavn, læruplass: Tórshavnar Skipasmiðja, Andrias Samuelsen, Tórshavn, læruplass: Tórshavnar Skipasmiðja.*



**Atstøðisnæmingar – maskin**

Petur Kári B. Funding, Hoyvík, Bjarni Arge Gregoriussen, Tórshavn, Jákup Egil Joensen, Sandvík, Aagi Niclasen, Miðvágur, Dan Bárður Thomassen, Tórshavn, Rúni E.D. Thomsen, Miðvágur, Jákup Thorsteinsson, Hoyvík. Hesir vanta á mundini: Sune Dam Frederiksen, Miðvágur, og Peter Old, Tórshavn.



**Elektrikarar**
*Rógvi Jacobsen, Glyvrar, læruplass: P/f El-Service á Skála, Arne Debess Madsen, Tórshavn, læruplass: P/f Einar Mikkelsen í Tórshavn, Heini Mohr Mortensen, Hoyvík, læruplass: P/f LM-Electric í Tórshavn, Rúni Mortensen, Streymnes, læruplass: Tummas Eli Hansen í Hoyvík, Dion Petersen, Tvøroyri, læruplass: Sp/f Bærendsen Teknik í Trongisvági, Høgni Rasmussen, Tórshavn, læruplass: P/f LM-Electric í Tórshavn, Jógvan Símun Sevdal, Runavík, læruplass: P/f El-Service á Skála, Bogi Sigurstein, Tórshavn, læruplass: P/f LM-Electric í Tórshavn, Lasse S. Thomsen, Tórshavn, læruplass: El-Service á Skála.*



**Framleiðslutøkningar**
*Kenneth Dam Frandsen, Tórshavn, Jóhan Hansen, Klaksvík, Martin Jóanesarson, Vestmanna, Jóhan Jógvansson, Saksun, Jákup av Kák, Tórshavn, Magnus Norðberg, Hoyvík, Erla á Bøgarði á Smið, Kaldbak. Hesir vanta á myndini: Jógvan Dam Frederiksen, Miðvágur, Svein Rógvi Nielsen, Klaksvík, Bergur Vinther, Vágur.*



**Húsasmiðir**
*Lars Abrahamsen, Rituvík, læruplass: Svenn Ó. Olsen í Syðrugøtu, Rógvi Árnason, Argir, læruplass: P/F Byggitek í Tórshavn, Pól Knút Davidsen, Toftir, læruplass: Haldur Vang Sp/f á Toftum, Sakaris Juul Heinesen, Tórshavn, læruplass: Byggisamtakið HJT á Argjum, Dávur Magnussen, Vestmanna, læruplass: Sp/f G.A.J. Smíð í Kvívík, Mikael Mikkelsen, Klaksvík, læruplass: Klaksvíkar Byggivirki í Klaksvík, Johan Martin Poulsen, Saltangará, læruplass: TN-Bygging á Glyvrum, Christian Sørensen, Trongisvágur, læruplass: Sp/f TMT í Trongisvági, Niels Weihe, Lamba, læruplass: TN-Bygging á Glyvrum. Vantar á myndini: Jóanis í Hoygarðinum, Tórshavn, læruplass P/F H.V. Lützen í Tórshavn.*